# Starvsfólk til nýggja dagstovnin í Sjóvar kommunu

**Sjóvar kommuna søkir eftir:**
- 1 varaleiðara
- pedagogum
- hjálparfólkum
- vaskifólki
- 1 køkshjálp

at byrja 1. november 2006.

Dagstovnurin verður opin millum kl. 7.00 og 17.15.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin, ið er normeraður til 84 børn, hevur 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og eina frítíðarstovu. Hvør stova, sum er væl útgjørd, hevur sína egnu inngongd. Eitt stórt felagsrúm, serstovur, viðtaluhølir og ymisk onnur hølir, sum kunnu nýtast til eitt hvørt.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt áhugavert starv, í einum umhvørvi tætt við náttúruna, har tú saman við góðum starvsfelagum fært møguleika at seta tín dám á stovnin og fært møguleikan at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á hesum nýggja stovni.

**Vit ynskja at umsøkjararnir:**
- Eru til reiðar at fara virknir inn í starvið og saman við sínum starvsfeløgum menna tað pedagogiska arbeiðið á stovninum
- Hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- Kunnu taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- Síggja møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum
- Hava hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemi í einum dagstovni.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera

**Sjóvar kommunu**
Att. Sonlis S. Høj Joensen
Skúlavegur 10
490 Strendur

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. juli 2006.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Sonlis S. Høj Joensen, leiðara á tlf. 219445.

Um ikki nóg nógvir pedagogar søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

# Søkt verður eftir vaskifólki

til Stranda skúla at byrja 15. august 2006.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. juli 2006.

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10 · 490 Strendur



# Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.
Opið verður 28. - 30. juli kl. 14.00 - 20.00.
Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg so í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 210299, 216561, 314400, 213450 ella 313788 áðrenn 15. juli.
Vinningurin av málningasøluni fer til vælgerandi endamál.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

# Til sølu

Sp/f Áarvegur 14 við øllum ognum felagsins til sølu um nóg høgt boð fæst.

***Áhugað kunnu ringja 284601 ella 315278***

**Frá Sunda kommunu**

# Pedagogur

## til Dagstovnin á Flatinum

Vit søkja eftir 1 pedagogi til vøggustovuna Tippið 30 t. um vikuna, at byrja 7. august ella eftir nærri avtalu.

**Um stovnin:**
Her ganga 85 børn í aldrinum 0-10 ár: 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og 1 frítíðarstova. Og tað arbeiða 23 starvsfólk.
Stovnurin sum bert er 1 ára gamal, hevur alt sum ein nútímans dagstovnur skal hava: eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstovu og ymisk verkstøð. Hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, við egnari inngongd.
Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum og stovnurin liggur sera væl fyri, t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum bussambandi.

**Vit ynskja:**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- at tú kanst taka ábyrgd og cirka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi
- at tú sært møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum.

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú saman við góðum starvsfelagum, fært møguleika at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf. 471030/771030 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf. 471034.

**Umsókn**
saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 11. juli 2006 og sendast til

**Dagstovnurin á Flatinum**
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakki

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við